# rsta málið



*Fyri tað nógva var B36-miðvøllurin fullkomuliga uttan sjálvsálit og myndguleika*
Mynd: Sofus D. Johannesen

an Mørkøre stútaði innlegg tvørtur um málið, og eina løtu tóktist dysturin at opna nakað. Hetta dovnaði tó skjótt aftur, og alt tóktist enda við javnleiki.

Fram til seinasta B36-álopið í dystinum, tá innskiftu spælararnir hjá B36 fingu høvuðsleiklutin. Allan Mørkøre sendi út til Levi Hanssen, og tá hesin sendi innfyri, var Óbi fyrstur á við stórutánni. Eftir 269 minuttum hevði B36 soleiðis skorað fyrsta málið, og hjá árstalsfelagnum við teimum stóru vónunum mundi hetta kennast, sum ein Óbi-skriviligur lætti.

## FAKTA UM DYSTIN

**B36-EB/Streymur 1-0 (0-0)**
1-0: Obele Okeke Onyebuchi, 90.
**B36:** Jákup Mikkelsen – Kenneth Jacobsen, Pól Thorsteinsson, Herbert í Lon Jacobsen, Alex dos Santos – Ingi Højsted (Bogi Hermansen, 70.), Fróði Benjaminsen, Mikkjal Thomassen (Obele Okeke Onyebuchi, 78.) – Bergur Midjord (Levi Hanssen, 46.), Allan Mørkøre, Eyðun Højgaard
**GK:** Fróði Benjaminsen, 52., Mikkjal Thomassen, 56.
**EB/Streymur:** Gunnar á Steig – Ólavur Poulsen, Egil á Bø, Andrzej Pacek, Esmar Eiðisgarð (Jóhan á Stongum, 62.) – Bárður Olsen (Eyðfinn Joensen, 71. (Sonni L. Petersen, 90.)), Marni Djurhuus, Knút Vesturtún, Gert Hansen, Hans Pauli Samuelsen – Sorin Anghel
**GK:** Hans Pauli Samuelsen, 10.
**Dómari:** Súni Johansen. Dømdi tað, sum skuldi dømast, uttan stórvegis roks



Neistin-VÍF 32-19(15-6)

# Sannførandi Neistasigur

Tað var ongantíð nakar ivi um sigurin, tá ið Neistin sunnudagin hevði vitjan av VÍF í høllini á Hálsi. Longu frá fyrsta bríksli setti heimaliðið seg á dystin, og vestmannakvinnur fingu ongantíð fótin fyri seg í dystinum.

Eina løtu í fyrra hálvleiki sá tað út til, at talan fór at gerast um tað heilt stóra skrædli, tí tá ið fimm minuttir vóru til hálvleiks, var Neistin á odda 14-3!

VÍF ressaðist tó eitt sindur, soleiðis at talan ikki gjørdist um nakað veruligt sorl. Men dysturin var tíðliga avgjørdur, og spenningur kom ongantíð í aftur. Enn einaferð var Simona Petersen besti málskjútti hjá Neistanum, og enn einaferð var Ioana Rapa drúgvast hjá VÍF.

**tn**

**Neistin-VÍF 32-19(15-6)**
**Neistin:** Simona Petersen 10(1), Annika Thomsen 6, Kára á Dunga 5, Marjun Tróndarson 3, Mia Káradóttir 3, Lív Reynheim 3(2), Jórun Ludvík 1, Unn Kragesteen 1
**VÍF:** Ioana Rapa 8, Barbara á Rógvu 3, Manuela Stan 2, Nikolina Eyðbjørnsdóttir 2, Alis Høghamar 1, Linda Johannesen 1, Torgunn Jónolvsdóttir 1, Annfríða Helgadóttir 1
**Brotskøst:** Neistin 4(3)
**Útvísingar:** Neistin 1, VÍF 1
**Dómarar:** Dánjal Samuelsen og Kristian Johansen

Kyndil-VB 17-38(9-20)

# Gott hál hjá VB

Vágskvinnur gjørdu tvey góð hál, tá ið tær um vikuskiftið vóru norðanfjørðs og spældu móti teimum báðum niðastu liðunum í Sunset-kappingini.

Fríggjakvøldið var dystast við Tjaldur, og leygardagin var túrurin so komin til Kyndil, ið eisini fekk oyruni í VB-maskinuna. Ikki kann sigast annað, enn at tað koyrir ómetaliga væl hjá VB-liðnum, og neyðars Guðrun í Lágabø í Kyndilsmálinum hevði úr at gera í dystinum móti barndómsfelagnum.

Enn einaferð vísti Daiva Tomaite seg sum tann stóri málskjúttin hjá oddaliðnum, men hesaferð var Christina Holm undir liðini á henni við eins nógvum málum.

**tn**

**Kyndil-VB 17-38(9-20)**
**Kyndil:** Randi Wardum 5, Sólvá Eystberg 3, Ann-Mari Wang 3, Hildur Høghamar 2, Súsanna Hansen 1, Kari-Ann Petersen 1, Súsanna Petersen 1, Linda Weihe 1
**VB:** Christina Holm 11(4), Daiva Tomaite 11(1), Laila Jespersen 5, Rannvá Augustinussen 4, Sólrun Krosslá 2, Margreth Augustinussen 2, Aukse Vysniaskaite 2, Arnleyð Hjelm 1
**Brotskøst:** Kyndil 2(0), VB 6(5)
**Útvísingar:** Kyndil 4
Dómarar: Eyðun Samuelsen og Hartvig Joensen

Søljan-StÍF 29-21(12-11)

# Tvey stig til Søljuna

Søljan heldur fast í plássinum í ovara hálvu á stigatalvuni í Sunset-kappingini. Sunnudagin hevði vágaliðið vitjan av StÍF, og hóast tað gekk javnt á í fyrra hálvleiki, so var eingin ivi um, hvat var betra liðið, tá ið avtornaði.

Strandakvinnur spældu annars fult upp við heimaliðið fyri steðgin, men beinan vegin í seinna hálvleiki setti Søljan ferð á, og so var einki at gera hjá StÍF.

Søljan avgjørdi í veruleikanum dystin fyrstu tíggju minuttirnar av seinna hálvleiki, tá ið tær nærum skoraðu eftir vild, og StÍF hevði einki mótvápn.

Enn einaferð var tað Nicoleta Radu Hansen, ið var besti málskjútti hjá Søljuni, meðan tær báðar Rebekka Justinussen og Poula D. Olsen vóru raskastar at skora fyri StÍF.

**tn**

**Søljan-StÍF 29-21(12-11)**
**Søljan:** Nicoleta Radu Hansen 12, Lina Andriulyte 5(1), Heidi Maria Akselsen 3, Hertha J. Simonsen 3, Fía Selma Nielsen 2, Petra Thomassen 2, Arnleyg Haraldsen 1, Erla Samuelsen 1
**StÍF:** Rebekka Justinussen 5(3), Poula D. Olsen 5, Súnfríð B. Jacobsen 4, Johanna í Króki 2, Rósa Johansen 2, Paula B. Høgnesen 2, Malan Petersen 1
**Brotskøst:** Søljan 1(1), StÍF 3(3)
**Útvísingar:** Søljan 3, StÍF 1
**Dómarar:** Hannis og Uni Wardum

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við